snorri@sosialurin.fo

# FIMM Á HÁLSI

**Seinnapartin mánadagin var Oyggjablaðið á Hálsi fyri at tosa við kundar í handlunum. Spurningur til teirra var hin einfaldi:** ***Hvussu ofta ert tú til handils her á Hálsi?***



**Menning Geyti, Havn**
*- Eg eri her á Hálsi einar tvær ferðir um mánaðin, og eri tá í onkrum av teimum stóru handlunum, sum til dømis í 2x3, BR, Svend Krosstein, Miðlon og av og á í Ide Møblum.*



**Erika L. Petersen, Oyndarfjørður**
*- Eg eri her einar 10-15 ferðir um árið, har á leið. Tá eri eg í einum av stóru handlunum sum til dømis 2x3, Vøgguni, Idé Møblum, Thomas Dam og her í Skemmuni.*



**Eilin Jørgensen, Havn**
*- Eg eri heruppi av og á, - sum oftast í onkrum av teimum stóru handlunum, sum til dømis í PE, Idé Møblum, í Miðlon og her í Skemmuni.*



**Søren Halling, Hoyvík**
*- Vit eru stutt síðani flutt í nýggjan bústað. Ti eri eg ofta her á Hálsi, eina ferð ella so um vikuna, - ofta í Beckers Málingahandli ella sum í dag í Idé Møblum.*



**Hjalmar Fløhamar, Fuglafjørður**
*- Eg veit ikki rættiliga. Tað er kanska eina ferð um mánaðin, sum oftast fyri at hyggja, men til aðrar tíðir at keypa. Í dag hava eg og konan bílagt okkum okkurt her úr Skemmuni.*